# Tey fríðkaðu um Grasagarð

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi og stundum regn. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

**Týsdagin tóku tey eldru í Tilhaldinum saman við børnum í 7. flokki í Kommunuskúlanum stig til at fríðka um Grasagarð**

UNG & ELDRI

*Stefan í Skorini*

Tey eldru í Tilhaldinum í Havn eru sera glað fyri Grasagarð, sum er tann vakri bletturin miðskeiðis í býnum. Tey hava tó varnast, at øll ikki eru eins fegin um henda urtagarðin. Tað eru ikki øll, ið ganga eins væl um garðin, og tí er hann ikki eins prýðiligur, sum hann skuldi verið.

Tí hava tey tikið upp samstarv við 7. flokkarnar í Kommunuskúlanum, sum liggur í grannalagnum, um at fríðka Grasagarð. Eini 45 børn ganga í 7. flokki í Kommunuskúlanum, og vónin er, at tey fara at síggja vakurleikan í Grasagarði.

Týsdagin fóru tey so til verka. Tey eldru í Tilhaldinum og børnini í 7. flokki saman við gartnarum og listafólki, sum skuldu leggja teimum lag á.



*Nógv virksemi var í Grasagarði týsdagin, tá eldri fólk úr Tilhaldinum og børn úr 7. flokki í Kommunuskúlanum fríðkaðu um Grasagarð saman við gartnarum og listafólki* Mynd: Jens Kr. Vang

Børnini skuldu planta, lúka, rudda, mála og nógv annað. Eisini skulu tey hjálpa listafólki í sambandi við Listastevnuna, sum verður í summar. Á skránni var eisini hugni saman við teimum eldru, og tey fingu okkurt gott til matna.

Ætlanin er, at hetta skal gerast eitt afturvendandi tiltak, sum verður á hvørjum ári hjá børnunum í 7. flokki í Kommunuskúlanum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 2 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | 14 |
| Halifax | 14 |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 19 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 28 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 29 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 14 |
| New York | |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 30 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | 31 |
| Rio de Janeiro | 11 |
| Buenos Aires | – |
| | 20 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 997 hPa í landnyrðing úr Føroyum fer í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 1006 hPa. vestan fyri Írland fer eisini í landnyrðing og dýpist nakað. Brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar leygardagin.




Lágtrýstið vestan fyri Skotland stendur mestsum í stað og hátrýstið yvir Íslandi fer spakuliga eystureftir.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/06 kl. 06⁰⁰– 20/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,8°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 19/06 kl. 06⁰⁰– 20/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 62,7 mm


**BILLUTIR**

ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR

**F.A. BILLUTIR**

tlf. 421605 fax 421666






fæst á apotekunum kring landið


### VESTFALLSKYRRINDI

18. juni: Fyrra kvarter
19. juni: Mánin næstur jørðini
24. juni: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. juni | 04.18 | 16.42 | 03.18 | 15.42 | 03.33 | 15.57 | 06.18 | 18.42 | 07.18 | 19.42 | 02.33 | 14.57 | 01.33 | 13.57 | 04.33 | 16.57 | 05.33 | 17.57 | 04.03 | 16.27 | 05.18 | 17.42 |
| 22. juni | 05.07 | 17.32 | 04.07 | 16.32 | 04.22 | 16.47 | 07.07 | 19.32 | 08.07 | 20.32 | 03.22 | 15.47 | 02.22 | 14.47 | 05.22 | 17.47 | 06.22 | 18.47 | 04.52 | 17.17 | 06.07 | 18.32 |
| 23. juni | 05.58 | 18.23 | 04.58 | 17.23 | 05.13 | 17.38 | 07.58 | 20.23 | 08.58 | 21.23 | 04.13 | 16.38 | 03.13 | 15.38 | 06.13 | 18.38 | 07.13 | 19.38 | 05.43 | 18.08 | 06.58 | 19.23 |
| 24. juni | 06.49 | 19.15 | 05.49 | 18.15 | 06.04 | 18.30 | 08.49 | 21.15 | 09.49 | 22.15 | 05.04 | 17.30 | 04.04 | 16.30 | 07.04 | 19.30 | 08.04 | 20.30 | 06.34 | 19.00 | 07.49 | 20.15 |

5 707265 100050 >